## Minni ófriður í nátt

Ófriðurin í Danmark helt fram í gjárkvøldið og í nátt, men tað var kortini heldur friðarligari enn leygarnáttina og sunnunáttina. Løgreglan fekk 88 fráboðanir um eld í gjárkvøldið og í nátt, og 29 ungólk vórðu tikin. Í Roskilde noyddust fólk at fara úr einum íbúðarhúsum, tí onkur hevði tveitt ein sokallaðan molotovcocktail inn í kjallaran. Tað eydnaðist kortini at sløkkja eldin beinanvegin. Í Brøndby Strand settu ungfólk eld á ein hjall. Eisini her fingu fólk boð um at fara úr íbúðum sínum, men tey sluppu kortini skjótt innaftur.



*Jón Ásgeir Jóhannesson er stjóri fyri hesar tríggjar fyritøkurnar: Baugur Group, FL Group og 365*

*Mynd: Vísir*

## Ísland má upp í ES

Tann kendi íslendski vinnulívsmaðurin Jón Ásgeir Jóhannesson vil hava íslendsku stjórnina at umhugsa spurningin um at søkja um limaskap í ES. Jón Ásgeir segði við íslendskar fjølmiðlar um vikuskiftið, at íslendingar kunnu ikki stinga høvdið niður í sandin, og hann segði seg vænta, at fer Ísland ikki upp í ES, fara teir íslendsku bankarnir at flyta av landinum. Hann segði seg vænta uppsagnir í bankunum tað næsta árið.

# Læra av hvørjum øðrum

**Vit eru fegin um at hava føroysku fysioterapeutarnar í felagnum. Teir hava møguleika at gera sær dælt av okkara orku, og vit kunnu læra av tí fjølbroytni, tað gevur at hava føroyingar við í felagnum, sigur Birgitte Kure, næstformaður í Danske Fysioterapeuter**



*Birgitte Kure, næstforkvinna í Danske Fysioterapeuter, og stjórin í felagnum, Jørgen Dreyer*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

FAKFELAGSRØRSLA

*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Fysioterapeutfelag Føroya hevði hábærsliga vitjan í sambandi við aðalfundin hjá felagnum leygardagin. Næstforkvinnan í Danske Fysioterapeuter, Birgitte Kure, var saman við nýggja stjóranum í felagnum, Jørgenh Dreyer, komin hendanvegin at taka lut í aðalfundinum.

Sum nevnt er stjórin nýggjur og hevði tí ikki áður verið í Føroyum, men fyri Birgitte Kure er støðan øðrvísi.

Eg var í Føroyum í november 2005 í sambandi við økisbroytingarnar, sum tá fóru fram í Danmark, og sum vit eisini tosaðu um við føroysku deildina av felagnum hjá okkum, sigur Birgitte Kure.

Bygnaðarfbroytingar fóru fram soleiðis, at talið av økisdeildum varð minkað úr fjúrtan niður í fimm.

Eitt annað, sum hon tá hevði frammi, var menningin av økisfysioterapiini, sum arbeitt var nógv við um tað mundi.Ynskir vóru eisini frammi í Føroyum um at styrkja økisfysioterapiina, sum framvegis ikki virkar optimalt.

Vitjanin hesaferð er mest ætlað sum ein liður í at kunna seg um viðurskiftini í Føroyum, umframt at luttaka á aðalfundinum.

Tað er serliga fyri at kunna okkum um arbeiðið innan økisfysioterapiina, og hvussu til stendur í hesum sambandi í Føroyum, sigur Birgitte Kure.

### Endurvenjing

Fyri einum ári síðani kom tann skipan í gildi, at ábyrgdin fyri endurvenjing hjá fólki, sum fóru av sjúkrahúsunum, kom at liggja hjá kommunum. Tað merkir, at øll almenn viðgerð eftir sjúkrahúsini hava útskrivað fólk eisini verður fíggjað av kommununum.

Hetta merkir so aftur, at kommunurnar hava ein áhuga í fyribyggjandi viðgerð, so fólk sleppa undan innleggingum á sjúkrahúsunum. Kommunurnar rinda eisini part av kostnaðinum, tá fólk verða innløgd á sjúkrahús, og tí hava tær eisini ein fíggjarligan áhuga í fyribyrgjandi arbeiðinum, sigur Birgitte Kure.

Hon vísir á, at skipanin hevur vart í eitt ár nú, og er undir støðugari menning, og tey eru í løtunik í holt við at greina út, hvørjar uppgávur av røttum hoyra heima á sjúkrahúsunum, og hvørjar hoyra heima uttanfyri.

Birgitte Kure greiðir frá, at sambandið millum móðurfelagið í Danmark og deildina í Føroyum er gott.

Umboð frá føroysku deildini taka lut á fundum hjá okkum, og vit hava javnt samband við føroysku limirnar, sigur Birgitte Kure.

Hon sigur, at tey hava eina rímiliga góða hylling á, hvussu viðurskiftini hjá limunum í Føroyum eru, og avbjóðingin liggur í, hvussu stuðlast kann undir at nóg nógvir fysioterapeutar skulu til fyri at kunna megna uppgávuna, og hvussu kemst hartil, at fáa innarbeitt eina skipan sum hana, ið Marjun Poulsen royndi við sínari verkætlan í 2006, har hon í tríggjar mánaðir vandi ein bólk av pensjónistum tvær ferðir um vikuna.

### Fyribyrgjan lønar seg

Allar royndir vísa, at sparingar eru í at halda fólki frá sjúkrahúsunum, og tí gongur tað alt meiri tann vegin, at pengar verða nýttir til fyribyrgjan, tí tað lønar seg í síðsta enda, sigur Birgitte Kure.

Hon sigur, at hetta er eitt sera gott hugskot og hon vónar, at tað eisini fer at bera til at fáa eina slíka skipan í lag í Føroyum.

Birgitte Kure er fegin um, at hava føroysku fysioterapeutarnar við í sínum felag. Hon vísir á, at fleiri limirnir eru, sterkari stendur felagið, og so heldur hon eisini, at danska móðurfelagið hevur nógv at bjóða føroysku limunum.

Føroysku limirnir kunnu søkja ráð og vegleiðing frá okkum í tann mun teir ynskja tað, tí tað er sjálvandi nógv, sum vit kunnu bjóða teimum, og so leingi føroyskir fysioterapeutar halda tað gevur meining at vera limir hjá okkum, vilja vit eisini gera okkara besta at hjálpa og stuðla teimum, sigur Birgitte Kure.

Hon undirstrikar týdningin av fyribyrgjandi arbeiði, og nevnir trý ítøkilig dømi. Ein bólkur eru fólk, sum fáa heilabløðing, og harvið lammast í aðrari síðuni, tað sum verður nevnt apoplexi. Tað er eingin ivi um, at við einum tilboði um endurvenjing eftir fyrstu tíðina á sjúkrahúsi í kommunalum regi, kunnu nógvir pengar sparast. Eitt annað dømi eru fólk, sum bróta hoftibeinið. Fáa tey endurvenjing eftir sjúkrauppihald, eru somuleiðis nógvir pengar at spara har.

Og sum triðja dømi nevnir hon tey eldru, sum – eins og royndirnar hjá Marjun Poulsen vístu – kunnu styrkjast munandi við fyribyrgjandi venjing.

Við slíkum venjingum hjálpa vit teimum eldru av vera heima longri, og harvið økja vit ikki bert um teirra lívsvirði, men spara samstundis samfelagnum pening.




*Nevndin í Fysioterapeutfelag Føroya saman við donsku gestunum. Frá vinstru Hervør Eyðinsdóttir, forkvinna, Hjørleif Niclasen, Marita Tórsheim, Jórun Simonsen, Klæmint Isaksen, Anna Maria Joensen, Jørgen Dreyer, Birgitte Kure, Sólbjørg Frederiksberg og Marjun Poulsen*

*Mynd: Jens Kristian Vang*